## Skúlastýrisval

Tað hevur alstóran týdning, at øll børn og ung fáa eina góða skúlagongd, har trivnaður og læring verða sett í miðdepilin. Skúlin skal vera eitt gott stað, har næmingar kenna, at teir verða hoyrdir, fáa avbjóðingar, verða tiknir við upp á ráð, og har læring og trivnaður ganga hond í hond.

Virksemið í fólkaskúlanum er grundað á samstarv millum skúla og heim, har aðalmálið er, at arbeiði skúlans skal fremjast við atliti at einstaka næminginum og í samstarvi við foreldrini.
Hetta er ásett longu í fyrsta setningi í endamálsgrein fólkaskúlans, "uppgáva fólkaskúlans er við atliti at tí einstaka næminginum og í samstarvi við foreldrini at fremja", og er hetta samstarv galdandi fyri alt virksemi skúlans bæði við altiti at fakligari og sosialari menning og trivnaði barnsins.

Fyri at røkka hesum máli er neyðugt, at eitt skipað samstarv er millum skúla og heim, og at foreldur eru við í arbeiðinum at mynda virksemið í tí skúla, har børn teirra ganga.

Eitt skúlastýri verður valt til hvønn sjálvstøðugan skúla í kommununi. Skúlastýrið er tað forum, har foreldur, umboð fyri kommunustýrið, starvsfólkaumboð og skúlaleiðarin hittast regluliga at viðgera m.a. meginreglur og arbeiðsumstøður, læring og trivnaðarátøk skúlans.

Samstundis verður við hesum veitt trygd fyri, at tær avgerðir, sum verða tiknar í skúlastýrinum, verða tiknar av fólki, sum varða av børnunum og kenna teirra tørv.

Tað er eyðsæð, at við skilagóðari hugsan og góðum samstarvi er hetta hollasta leiðin til menning og framburð í gerandisdegi skúlans.

## Limirnir í skúlastýrinum

Limirnir í skúlastýrunum eru foreldraumboð, kommunustýrisumboð, starvsfólkaumboð og skúlaleiðarin. Talið á foreldraumboðum og kommunustýrisumboðum er ásett í mun til skúlastødd.

Í skúlum, sum hava 20 næmingar ella fleiri, eru umboðini:
- 3 foreldraumboð
- 2 kommunustýrisumboð
- 1 umboð fyri lærararnar og hini samstarvsfólkini og
- skúlaleiðarin

Í skúlum, sum hava færri enn 20 næmingar, eru umboðini:
- 2 foreldraumboð
- 1 kommunustýrisumboð og
- skúlaleiðarin

Á skúlastýrisvalinum verða foreldraumboðini vald, meðan nývalda kommunustýrið velur kommunustýrisumboðini. Skúlaleiðarin er fastur limur og starvsfólkaumboðið verður valt á hvørjum ári millum starvsfólk skúlans, sum hava undirvísingarligar uppgávur.



Mynd:
Eysturskúlin

## Valrætt og valbæri

Valrætt og valbæri hava:
Foreldur, sum hava foreldramyndugleikan yvir teimum børnum, sum eru skrivað inn í skúlan.

1. Tá ið foreldur eru gift, hava bæði foreldrini foreldramyndugleika yvir felags børnum

2. Tá ið foreldur ikki eru gift, eru tveir møguleikar fyri foreldramyndugleika

a) Mamman hevur sum høvuðsreglu foreldramyndugleikan, tó kann pápin í serligum føri hava fingið foreldramyndugleikan

b) Foreldur, sum ikki eru gift, kunnu hava avtalað felags foreldramyndugleika við fráboðan til Ríkisumboðið, sambært § 6 í Anordning nr. 228 frá 15. mars 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om forældremyndighed og samvær.

3. Felags foreldramyndugleiki, ið myndugleiki uttanlands hevur ásett, verður varðveittur í Føroyum.

4. Tey, sum hava børn til fosturs, kunnu sambært § 65, stk. 2 í fólkaskúlalógini fáa rættindi sum foreldramyndugleiki í sambandi við skúlaviðurskifti.

| Kunning | Vallistar | Uppstillingarfundur | Uppstillingarlistar | Valið |
|---|---|---|---|---|
| oktober | 20. oktober | 27. oktober | 3. november | 10. november |
| Tilfar verður sent foreldrum | Skráseting á vallista<br>Vallistin liggur frammi | Fundur í skúlanum.<br>Valnevndin kann víkja frá dagfestingini | Skulu latast formanninum í valnevndini 7 dagar fyri valdagin. | |